# Bilar

Nr. 99 • mikudagur • 24. mai 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo




Bilstevna í Klaksvík:

# Yvir 40 bilar í KÍ høllini




*Yvir 40 bilar av 15 ymiskum bilmerkjum vóru á bilsetvnuni í KÍ-høllini seinasta vikuskifti*

**Seinasta vikuskfti, leygardagin 20. og sunnudagin 21. mai, var KÍ-høllin í Klaksvík karmur um eina stóra bilstevnu við yvir 40 bilum av 15 ymiskum bilmerkjum. Eisini vóru nakrar motorsúkklur sýndar fram**

BILSTEVNA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Áðrenn Norðoyatunnilin lat upp, var Klaksvík ein avskorin býur og tiltøk sum bil- og sølustevnur vóru meira fyri fólk í Norðoyggjum, men nú er lætt og ómakasleyst at koyra til Klaksvíkar.

Seinasta vikuskfti var ein stór bilstevna í KÍ-høllini við yvir 40 bilum av 15 ymiskum bilmerkjum. Umframt bilar vóru eisini nakrar motorsúkklur sýndar fram.

Fyrimunurin við eini slíkari bilstevnu er, at fólk kunnu ganga inni í høllini og hyggja at bilunum og fáa eitt bilprát við tey ymisku sølufólkini á stevnuni og kanska fáa eitt gott tilboð. Tað vísir seg, at fleiri bilar verða seldir á eini slíkari stevnu.

Hetta var samstundis fyrsta bilstevna, síðan Norðoyatunnilin lat upp, og fólk úr meginpartin av landinum høvdu møguleika at koyra til Klaksvíkar.

Hóast veðrið ikki var serliga gott, var framsýningin væl vitjað og ein av fyrireikarunum, Niclas Heri Jákupsson, sigur, at bilhandlararnir vóru væl nøgdir við stevnuna.













## Fólkafundur sunnudagin

Norðoyastevnudag verður tann vanligi fólkafundurin hildin í Vágstúni. Skrúðgonga við Klaksvíkar Hornorkestri, skótum, ítróttarfólki og hestum fer úr Klaksvíksgarðinum og heim í Vágstún klokkan 14.00. Tá ið fólk og djór eru komin í Vágstún, fer Ísak Mikladal, aðalskrivari í Fótbóltssambandinum, at flyta fram røðu. Ísak var ein av teimum, sum á sinni tók stig til NFÍ, ið nú skipar fyri Norðoyastevnuni, og hann hevur eisini áður verið virkin í fyrireikingunum. Klaksvíkar Hornorkestur fer eisini at spæla til fólkafundin.

## Fuglfirðingur fer at røða

Norðoyastevnuaftan verður midnáttasamkoma í Vágstúni. Hetta hevur seinnu árini verið størsta tiltakið á Norðoyastevnuni, og hetta plagar at vera ein sera hugnalig løta. Kyndlagonga kemur í Vágstún á midnátt, og tá fer fuglfirðingurin og listamaðurin Frits Johannesen at flyta fram røðu. Aftan á verður fýrverk á Vágsbøi, og síðani verður felagssangur í Vágstúni.